Búskaparráðið
Tíðindaskriv 8. mars 2010

# Inntriv neyðug nú

## Í seinasta lagi í sambandi við fíggjarlógina fyri 2011 mugu fíggjarpolitisk inntriv fremjast í Føroyum. Tamarhald má fáast á almenna hallinum og vaksandi skuldini. Inntrivini eiga at bøta um javnvágina millum inntøkur og útreiðslur og tryggja búskaparvøkstur, sum frá líður. Búskaparráðið hevur eina røð av uppskotum til fíggjarpolitisk inntriv í nýggjastu frágreiðing síni

Búskaparráðið hevur í dag almannakunngjørt búskaparfrágreiðing sína. Í tí sambandi sigur formaðurin í ráðnum, Thomas Dam:

"Bindandi inntriv, ið røkka nøkur ár fram, eru bráðneyðug. Tað er nú, at inntrivini skulu leggjast til rættis, so tey kunnu setast í verk 1. januar í 2011. Umráðandi er, at fáa tamarhald á stóra hallinum og skuldini. Uttan inntriv nú, verður tungt at koma aftur á beint seinni. Rásarúm er í búskapinum, so inntriv kunnu gerast, samstundis sum grundleggjandi vælferðartænastur verða varðveittar og sloppið verður undan at hækka inntøkuskattin".

Høvuðstættir í nýggju búskaparfrágreiðingini:

- Almenna hallið og vaksandi skuldin eru størstu búskaparligu avbjóðingar í dag
- Neyðugt er við inntrivum á fíggjarlógini fyri 2011, ið gera munandi ábøtur á javnvágina millum inntøkur og útreiðslur
- Neyðugu inntrivini eiga at hava hesi endamál:
    - Fáa tamarhald á hallinum og vaksandi almennu skuldini
    - Tryggja búskaparvøkstur
    - Fáa fleiri skattakeldur
    - Varðveita grundleggjandi vælferðartænastur
    - Sleppa undan at hækka lønarskatt
- Verandi rásarúm í búskapinum kann framhaldandi stimbra innlendis eftirspurningin og varðveita grundleggjandi vælferðartænastur
- Tekin eru um búskaparvøkstur, tí nýtsla og inntøkur í fiskivinnuni helst vaksa komandi árini

Búskaparráðið hevur m.a. hesi uppskot til fíggjarpolitikkin fyri 2011:

- Útreiðslukarmurin í mesta lagi vaksa 2% um árið komandi fýra árini
- Tilfeingisgjald leggjast á tilfeingisvinnurnar
- Sjómannafrádráttur og inntøkutrygd takast av
- Hækka pensjónsaldurin
- Undantøk frá oljuavgjaldi strikast
- Ognarskattur setast í verk
- Vegskattur leggjast um

**Fleiri upplýsingar eru í búskaparfrágreiðingini, ið liggur á www.buskap.fo.**
**Formaðurin í Búskaparráðnum, Thomas Dam, er at hitta á tel. 591111.**